## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinni lækkar hann niður í eystan. Nakað av sól, tó okkurt vátakava- ella heglingsælið. Hitin um frostmarkið ella eitt vet omanfyri.




**Veðrið hósdagin:**
At byrja við lot til andøvsgul av eystri við nakað av sól og hitin eitt vet oman fyri frostmarkið. Um náttina veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi. Tað verður skýggjað og helst turt. Hitin økist eitt vet.




**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Strúkur í vindi upp í skrið av landsynningi, sum støkkur vesturum til útsynning og minkar niður í andøvsgul upp í ein strúk. Skýggjað við regni í skiftum og møguliga mjørki. Hitin økist til millum 5 og 8 stig.

**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði. Tað klárar í, tó partvís við vátakava- ella heglingsælingi. Hitin fellur til millum 2 og 5 stig.

# Barnagarður hevur framsýning

**Barnagarðurin við Velbastaðvegin hevur síðani september mánað arbeitt við at gera eina framsýning, sum nú verður sýnd fram**



BARNAGARÐS-ARBEIÐI
*Heini í Skorini*

Børnini á barnagarðinum við Velbastaðvegin hava síðani september mánað arbeitt við einum projekti, sum pedagogarnir á barnagarðinum kalla »Føroyar«. Mona Rasmussen Mohr er ein av starvsfólkunum á barnagarðinum, og hon sigur, at tey hava gjørt eina framsýning úr føroyskum tilfari, og hava tey fingist við føroyska mentan. Arbeitt hevur verið við ull, gomul spøl hava verið gjørd og spæld, so sum spælið »kasta kongar«, og tey hava gjørt alskyns lutir og myndir úr føroyskum tilfari, sum nú verður víst fram fyri foreldrum og sjálvbodnum í Barnagarðinum við Velbastaðvegin, og undir framsýningi er turrur fiskur og spik eisini at fáa.

Í samband við projektið »Føroyar« hava børnini eisini gjørt føroyskan mat, so sum rullupylsu, blóðpylsu og drýl, vitja ein bóndagarð, velt eplir, verið á floti o.s.fr. Øll børnini á barnagarðinum hava verið við í arbeiðinum til framsýningina, og eru tey umleið 60 í tali. Føroyska landkortið er eisini gjøgnumgingið við børnunum, og hava tey eisini lært um føroysku djórini.

Mona Rasmussen Mohr sigur, at børnini gerast kreativ av slíkum arbeiði, og at tað er sera mennandi fyri tey.

At hetta kveikir alsk til føðilandi frá barnsbeini av, er einki at ivast í, og er hetta at fegnast um. Við at vera á floti, vitja bóndagarðar, velta eplir os.sfr., fáa børnini eisini innlit í føroyska ríkidømið, mentan og tilfeingi, og tey síggja, hvussu gomlu føroyingarnir gjøgnum øldir hava bygt hetta land. Sera áhugavert og gott arbeiði frá starvsfólkunum á Barnagarðinum við Velbastaðvegin, sum børnini uttan iva fara at njóta gott av.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷10 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷9 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 14 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 9 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 5 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 16 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 13 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 21 |
| New York | 21 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 34 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 23 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt veikt lágtrýst fer komandi dagarnar undan Íslandi móti Suðurnoregi, meðan eitt hátrýst yvir Eystugrønlandi fer í ein landsynning.




Fríggjadagin nærkast eitt nýtt lágtrýst Íslandi av útsynningi og brúgvaløg við regni og vindi snara inn yvir Føroyar. Lágtrýstið heldur áfram í landnyrðing ella eystan og køld luft haðani rekur inn yvir oyggjarnar av norði.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/04 kl. 06[00]–10/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 4,4°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 09/04 kl. 06[00]–10/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 43,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

5. apríl: Mánin næstur jørðini
8. apríl: Fullmáni
15. apríl: Seinna kvarter
17. apríl: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 11. apr | 10.02 | 22.26 | 09.02 | 21.26 | 09.17 | 21.41 | — | 12.02 | 00.37 | 13.02 | 08.17 | 20.41 | 07.17 | 19.41 | 10.17 | 22.41 | 11.17 | 23.41 | 09.47 | 22.11 | 11.02 | 23.26 |
| 12. apr | 10.51 | 23.16 | 09.51 | 22.16 | 10.06 | 22.31 | 00.26 | 12.51 | 01.26 | 13.51 | 09.06 | 21.31 | 08.06 | 20.31 | 11.06 | 23.31 | — | 12.06 | 10.36 | 23.01 | 11.51 | — |
| 13. apr | 11.42 | — | 10.42 | 23.07 | 10.57 | 23.22 | 01.16 | 13.42 | 02.16 | 14.42 | 09.57 | 22.22 | 08.57 | 21.22 | 11.57 | — | 00.31 | 12.57 | 11.27 | 23.52 | 00.16 | 12.42 |
| 14. apr | 00.07 | 12.38 | 11.38 | — | 11.53 | — | 02.07 | 14.38 | 03.07 | 15.38 | 10.53 | 23.24 | 09.53 | 22.24 | 00.22 | 12.53 | 01.22 | 13.53 | — | 12.23 | 01.07 | 13.38 |

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666